LANDSVERK
byggir land

# Vegleiðing um valplakatir við landsveg

Endamálið við hesi vegleiðing er at tryggja ferðsluna á landsvegi og samstundis tryggja møguleikan at seta upp valplakatir í sambandi við val.
Við uppseting av valplakatum við landsveg krevst ikki serstakt loyvi, um ásetingarnar í hesi vegleiðing verða fylgdar.

**Valplakatin**

- Valplakatin skal verða límað á eina veðurdygga plátu, sum ikki er størri enn 0,8 m².
- Valplakatin skal ikki innihalda tilfar sum skyggir, kastar aftur, speglar, gevur endurskin ella vera upplýst við sjálvstøðugari ljóskeldu
- Valplakatin má ikki bera brá av ferðsluskelti

**Nær kunnu valplakatir uppsetast**

- Valplakatir kunnu heingjast upp í sambandi við løgtings- og fólkatingsval, kommunuval, fólkaatkvøður og onnur almenn val.
- Valplakatir kunnu heingjast upp í tíðini frá fjórða leygardegnum undan valdegnum til 4 dagar eftir valið.

**Hvar kunna valplakatir uppsetast**

- Valplakatir kunnu heingjast upp á lyktasteyrar og á útbúnað, ið trygt er festur í jørðina, og hevur til endamáls at sýna fram valplakatir.

**Hvar kunnu valplakatir ikki setast**

- Við landsveg, har ferðmarkið er hægri enn 60 km/t.
- Á sama útbúnað, sum góðkendur er til ferðslumerking, herundir ferðsluskelti, vegvísingarskelti ella líknandi vegaútbúnað,
- Í miðøkinum á rundkoyringum og á ferðsluoyggjum
- Nærri enn 0,5 m frá vegjaðara ella 0,3 m frá súkklubreytajaðara, mált frá nærmasta kanti á valplakatini,
- Lægri enn 2,3 m beinleiðis yvir eini gongu- ella súkklubreyt, mált frá niðasta kanti á valplakatini,
- Á ein tílíkan hátt, at valplakatin kann hava við sær skaða á ljósmastrar, stik, garðar o.l

Valplakat má ikki heingjast upp á ein tílíkan hátt, at hon fjalir ta góðkendu vegamerkingina, órógvar útsýnisviðurskiftini á vegnum ella annars er til ampa fyri ferðslutrygdina.

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

Valplakatin skal vísa navn, bústað og telefonnummar á tí persóni ella flokki, sum hevur ábyrgdina av plakatini.

Valplakat, sum eru hongd upp ímóti reglunum, skal takast niður aftur innan 12 tímar, eftir at løgreglan hevur kravt, at tær skulu takast niður.

Løgreglan kann taka valplakatir niður, sum ikki eru tiknar niður innan 12 tímar, eftir at løgreglan hevur boðað frá kravinum um at taka tær niður ella tær eru hongdar upp uttan fyri loyvdu tíðina. Løgreglan kann eisini taka niður valplakatir, sum eru hongdar upp ímóti reglunum í § 49, stk. 2 í ferðslulógini og sum ikki vísa tær kravdu kontaktupplýsingarnar.

Valplakatir, sum hava við sær ein beinleiðis og ítøkiligan vanda fyri ferðslutrygdina, kunnu beinanvegin takast niður av løgregluni. Løgreglan skal síðani seta seg í samband við tann, sum hevur havt uppheingingina um hendi og biðja viðkomandi um at koma eftir niðurtiknu valplakatunum. Valplakatir, sum ikki eru avheintaðar í seinasta lagi 2 mánaðir eftir valdagin, kunnu síðani beinast burtur.

Útreiðslur hjá løgregluni av at taka niður, varðveita og at gera aftur skaddar steyrar, hegn o.a. verður sum útgangsstøði goldið av tí, sum hevur havt uppheingingina um hendi.

Tórshavn sep. 2016

Landsverk | Føroya Landfúti

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo